# Fulham fekk Litmanen

Fulham kunngjørdu í gjárkvøldið, at felagið hevur megnað at fingið 36-ára gamla finlendingin, Jari Litmanen til felagið. Talan er fyribils bert um sáttmála til kappingarenda. Fyrrverandi Liverpool, Barcelona og Ajax áleyparin fer at endurnýggja sítt vinarlag við venjaran Roy Hodgson, ið var finskur landsliðsvenjari til júst loknu EM-undankapping. Finlendingurin Jari Litmanen er ikki ein ársungi longur, men evnini eru somikið góð, at hann væl kann nýtast í felagnum, veit Fulham venjarin, Roy Hodgson at siga fyri heimasíðuni hjá Fulham í gjárkvøldið, eftir at undirskriftin var avgreidd.



Fólk søkist

Vegna vaksandi virksemi verður søkt eftir vaktarfólki til vaktarleiðina í Tórshavn.

Rein revsiváttan og koyrikort er ein treyt. Nærri fæst at vita hjá vaktleiðaranum tlf. 50 50 60 ella stjóranum tlf 50 50 61.

ANSNI
TRYGDARFELAG

POSTBOKS 2032 • 165 ARGIR
TELEFON 505050 / 505061
ANSNI@ANSNI.FO • WWW.ANSNI.FO

# Ungdómsdystur í Havn

**Ein sonn ungdómsuppgerð verður spæld í Havn í dag, tá Fleyr tekur móti TB í bestu flogbóltsdeildini hjá kvinnum**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Fyrsti dysturin um vikuskiftið byrjar longu í kvøld, tá botnproppurin Fleyr tekur móti næstaftasta liðnum TB. Hesi bæði lið teljast millum yngstu liðini í deildini, og manglandi royndirnar hava kanska gjørt sítt til at liðini liggja á hesum plássunum.

Í oddinum er spenningurin størri, eftir at stigini vórðu hálveraði, men tó tykjast SÍ og ÍF at vera eina tonn frammanfyri hini liðini. ÍF við sínum drúgvu royndum, og SÍ við sínum dirvi og áræði.

Aftanfyri tey bæði fremstu koma so Dráttur og KÍF, ið berjast um triðja plássið. Og har er heldur ikki til at taka dagar millum, hvørt teirra hevur størri møguleika. Bæði liðini spæla til tíðir avbera væl, men fella oftast uppá keðiligir og óneyðuga nógvir feilir. Tá gerst tungt at vinna dystir.




*Skal Fleyr gera sær nakra vón um at náa TB aftur, mugu tær vinna dystin í dag á heimavølli móti júst TB, ið saman við nøkrum av hinum liðunum í deildini hevur fleiri dystir at spæla hetta vikuskiftið*

## FAKTA

**Dystir um vikuskiftið:**

**HONDBÓLTUR:**
**Atlantic Airways-kappingin:**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 02.02 | 16:00 | StÍF-H71 |
| 03.02 | 16:00 | VÍF-KÍF |
| 03.02 | 16:00 | Kyndil-Neistin |

**Sunset-kappingin:**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 02.02 | 14:30 | StÍF-Stjørnan |
| 03.02 | 14:30 | VÍF-VB |

**FLOGBÒLTUR:**
**Meistaradeild, Kvinnur:**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 01.02 | 18:00 | Fleyr-TB |
| 02.02 | 11:30 | Dráttur-TB |
| 02.02 | 14:00 | SÍ-Mjølnir |
| 03.02 | 14:00 | SÍ-Dráttur |

### Fleiri dystir um vikuskiftið

Trý av liðunum í bestu kvinnuligu flogbóltsdeildini skulu spæla tveir dystir um vikuskiftið, og hesi eru TB, Dráttur og SÍ. Meðan tað hjá monnunum gongur heldur striltið við at halda ásettu spælidagarnar. Fleiri dystir eru útsettir hjá teimum, og tað sama er galdandi fyri dystin, ið skuldi vera um vikuskiftið millum SÍ og ÍF. Nær hesir útsettu dystir verða spældir, fæst at vita, við at fara inn á heimasíðuna hjá Flogbóltssambandi Føroya, www.fbf.fo.

**Flogbóltur**
**Meistaradeild kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 12 | 11 | - | 1 | 35 | 9 | 26 | 11 |
| 2 ÍF | 12 | 10 | - | 2 | 32 | 12 | 20 | 10 |
| 3 Dráttur | 12 | 8 | - | 4 | 28 | 19 | 9 | 8 |
| 4 KÍF | 13 | 6 | - | 7 | 25 | 23 | 2 | 7 |
| 5 Mjølnir | 12 | 5 | - | 7 | 20 | 26 | -6 | 5 |
| 6 TB | 12 | 3 | - | 9 | 13 | 29 | -16 | 3 |
| 7 Fleyr | 13 | 0 | - | 13 | 4 | 39 | -35 | 0 |

**Meistaradeild menn**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 8 | 5 | - | 3 | 18 | 12 | 6 | 7 |
| 2 ÍF | 7 | 5 | - | 2 | 17 | 13 | 4 | 6 |
| 3 SÍ | 8 | 5 | - | 3 | 21 | 14 | 7 | 5 |
| 4 Fleyr | 9 | 1 | - | 8 | 9 | 26 | -17 | 2 |

**Hondbóltur**

SUNSET KAPPINGIN KVINNUR

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 13 | 11 | - | 1 | - | 1 | 380 | 281 | 99 | 23 |
| 2 VB | 12 | 7 | - | 2 | - | 3 | 278 | 249 | 29 | 16 |
| 3 Neistin | 12 | 7 | - | 0 | - | 5 | 295 | 282 | 13 | 14 |
| 4 StÍF | 13 | 4 | - | 1 | - | 8 | 290 | 325 | -35 | 9 |
| 5 Kyndil | 13 | 4 | - | 1 | - | 8 | 292 | 338 | -46 | 9 |
| 6 VÍF | 13 | 2 | - | 1 | - | 10 | 276 | 336 | -60 | 5 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN MENN

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 13 | 10 | - | 1 | - | 2 | 377 | 308 | 69 | 21 |
| 2 Neistin | 13 | 9 | - | 1 | - | 3 | 369 | 338 | 31 | 19 |
| 3 H71 | 13 | 6 | - | 0 | - | 7 | 333 | 326 | 7 | 12 |
| 4 Kyndil | 13 | 6 | - | 0 | - | 7 | 328 | 351 | -23 | 12 |
| 5 VÍF | 13 | 5 | - | 1 | - | 7 | 354 | 374 | -20 | 11 |
| 6 KÍF | 13 | 1 | - | 1 | - | 11 | 312 | 376 | -64 | 3 |



Sethús til sølu
Krosslíð 4, Tórshavn

Sera vælhildin sethús í 2 hæddum til sølu.

**Miðhædd:** hjallur, gongd, wc, baðirúm, sovikamar, 3 kømur, køkur, spísistova og stova.

**Kjallari:** gongd, lítil køkur, wc, baðirúm, fýrrúm, trappugongd, tvey stór kømur, kjallararúm og vaskirúm.

Húsini hava urtagarð og liggja sera veðurgott.

**Áhugaði kunnu ringja tlf. 281414, 270484 ella 317306**




FØRARAR TIL BETONGBILAR

J & K Betong søkir eftir førara til betongpumpubil og betongbil. Talan er um krevjandi arbeiði og roknast kann við nógvari yvirtíð. Tann, ið settur verður, kann byrja beinanvegin, men vit eru tilreiðar at bíða eftir rætta persóninum.

Løn sambært avtalu.

Sendið umsóknina til adressuna niðanfyri, stílað til Arngrim Arngrimsson, blandimeistara, í seinasta lagi mikudagin 6. februar. Spurningar viðvíkjandi starvinum kunnu setast Arngrími á tel. 585025.

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn
tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: betong@jkp.fo | www.jkp.fo | Blandimeistarin tel 58 50 25
J & K Betong